# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hvør av okkum hevur tað, sum skal til fyri at røkja tað tyngsta arbeiðið, sum er? Ein má vera fyrireikað til alt*

*(Hillary Clinton)*

# Í dag er hennara seinasti møguleiki



Uppstillingarvalið í Pennsylvania í kvøld er avgerandi fyri politisku lagnuna hjá Hillary Clinton. Tapir hon, eru hennara møguleikar at gerast forsetavalevni hjá demokratunum farnir. Men tað er einki, sum bendir á, at henni nýtist at stúra, tí sambært kanningunum fær hon millum 48 og 52 prosent av atkvøðunum, meðan Barrack Obama fær 42 prosent.

*Hillary Clinton á veljarafundi í Philadelpha í gjár (Mynd: Polfoto)*

# Royna at steðga vápnaskipi

**USA leggur trýst á fleiri lond har suðuri í Afrika fyri at fáa tey at steðga einum kinesiskum skipi, sum er fermt við vápnum til Zimbabwe**




*"An Yue Jiang" hevur 70 tons av vápnum og lóðuri til herin í Zimbabwe (Mynd: Reuters)*

Amerikanskar fregnartænastur halda støðugt eyga við tí kinesiska farmaskipinum "An Yue Jiang", og amerikanskir diplomatar í londunum í syðra parti av Afrika hava fingið boð úr Washington um at leggja trýst á stjórnirnar í grannalondunum hjá Zimbabwe fyri at fáa tær at forða fyri, at vápnini sleppa til Zimbabwe.

Keldur í amerikanska uttanríkisráðnum vátta fyri Reuters, at diplomatarnir leggja serliga trýst á myndugleikarnar í Angola og Namibia, og stjórnirnar har hava fingið greitt at vita, at tað fer at skaða teirra viðurskifti við USA, sleppur tað kinesiska skipið at bryggju har.

Angolsku myndugleikarnir søgdu í gjár, at "An Yue Jiang" hevur ikki biðið um og tí heldur ikki fingið loyvi til at koma inn í angolskan sjógv.

Forsetin í Zambia, Levy Mwanawasa, hevur mælt øllum londunum í syðra parti av Afrika til at steðga vápnaflutninginum til Zimbabwe við at nokta tí kinesiska skipinum at koma inn um sjómarkið. Mwanawasa, som eisini er formaður í felagsskapinum hjá londunum har suðuri í Afrika, sigur, at vápnini fara at økja spenningin í Zimbabwe.



*Philip Miles skal sita trý ár í russiskum fongsli (Mynd: Reuters)*

# Prestur dømdur fyri smugling

**Ein amerikanskur prestur skal sita góð trý ár í russiskum fongsli fyri at hava smuglað lóður til Russlands**

Philip Miles, sum varð dømdur í einum rætti í Moskva í gjár, játtaði seg sekan í at hava smuglað lóður til Russlands, men hann segði seg ikki hava hugsað um, at tað var ólógligt. Hann ætlaði sær heldur ikki at brúka patrónirnar, men segði, at tær vóru ætlaðar nøkrum vinmonnum, sum eru veiðimenn.

Men tað hjálpti ikki. Dómurin var trý ár og tveir mánaðir í fongsli. Philip Miles hevur sitið í varðhaldi í Moskva síðani 3. februar, tá tollararnir funnu fleiri patrónir í viðføri hansara.

- Eg eri rættiliga vónsvikin, tí hetta var ein harður dómur fyri eina eskju av patrónum, segði Philip Miles, tá hann hevði fingið dómin. Tað sama segði verji hansara, skrivar Reuters.

## STUTT SAGT

### Krevja loysigjald



Somalisku sjórænararnir, sum rændu eitt spanskt tunfiskiskip sunnudagin, krevja loysigjald aftur fyri at lata manningina, sum telur 26, leysa. Somaliska útvarpið segði í gjár, at sambært spanska skiparanum fekk eingin av manningini nakað mein, tá skipið bleiv rænt. Útvarpið endurgav ein mann, sum varð sagdur at vera oddamaður hjá sjórænarunum, fyri at siga, at teir vildu hava pengar aftur fyri at latta sjómenninar leysar. Útvarpið segði einki um, hvussu nógvar pengar talan er um, ella hvussu spaniumenn skulu gjalda. Spanska uttanríkisráðið sigur, at eitt spanskt herskip er á veg í somaliskan sjógv, og landið hevur biðið onnur lond, sum hava herskip har um vegir, um hjálp. Sum skilst er helmingurin av manningini á tunfiskaskipinum spaniumenn.

### Lá 90 minuttir í ísi

Tann 43 ára gamli kinesarin Wang Jintu kláraði at liggja 90 minuttir í ísi. Tað er nýtt heimsmet og 17 minuttir longri enn tað gamla metið. Wang, sum er ættaður í Fujian-landslutinum, setti heimsmetið í einum klubba í kinesiska høvuðsstaðnum Beijing. Sagt verður, at tá hann fór úr ísinum, var hann so stirdur, at hann mátti fáa hjálp til at koma upp á beinini. Wang hevur fingið at vita, at met hansara kemur í heimsmetabókina hjá Guiness. Tað gamla metið átti niðurlendingurin Wim Hof, og tað setti hann í Madrid fyrr í vetur.